# VERKSETANARÆTLAN

1996

UPPSKOT UM NÝSKIPAN

# Innihaldsyvirlit

1. INNGANGUR ..... 2

1.1 AÐALSTÝRINI ..... 2
1.2 ONNUR UPPSKOT TIL NÝSKIPAN ..... 2

2. VERKÆTLANIR ..... 4

2.1 VERKÆTLANIR ..... 4
2.2 LØGMANSSKRIVSTOVAN ..... 4
2.3 FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ ..... 4
2.4 VEIÐIMÁLASTÝRIÐ ..... 4
2.5 VINNUMÁLASTÝRIÐ ..... 5
2.6 MENTAMÁLASTÝRIÐ ..... 5
2.7 HEILSUMÁLASTÝRIÐ ..... 6

3. FYRISKIPANARÆTLAN ..... 7

3.1 TÍÐARSKEIÐIÐ FRAM TIL ÓLAVSØKU 1996 ..... 7
3.2 AFTANÁ ÓLAVSØKU 1996 ..... 7

4. JÁTTANARTØRVUR Í SAMBANDI VIÐ NÝSKIPAN OG SAMSKIPAN ..... 9

5. STILLINGSOPSLAG (UDKAST) ..... 11

# 1. Inngangur

Uppskotini, sum gjørd eru viðvíkjandi nýskipanini, eru skipað soleiðis, at í fyrsta umfari verður talan um at seta í verk tann partin, sum er neyðugur, orsaka av ráðharraskipanini, sum kemur í gildi á Ólavsøku 1996

## 1.1 Aðalstýrini

Fyrst verður farið undir at skipa aðalstýrini. Hendan uppgávan er í sjálvum sær víðfevnd. Fyri at tryggja, at partarnir, ið skulu verða í aðalstýrunum, ikki verða óneyðuga nógv órógvaðir, verður lagt upp til, at eindirnar, sum verða lagdar saman, deildir ella stovnar, í fyrsta umfari varðveita tær uppgávur, sum tær frammanundan røkja. Framhaldandi skipanin av aðalstýrunum, verður sett í verk aftaná 1. august 1996.

Ein av teim týdningarmiklu uppgávunum fram til 1. august 1996, verður at seta aðalstjórar og deildarstjórar í aðalstýrunum. Setanin av stjórunum hevur avgerandi týdning fyri framhaldandi arbeiðið við verksetanini av nýskipanini. Í fyrstu frágreiðing, sum eitur Niðurstøður, verður greitt frá, hvussu bygnaðurin í aðalstýrunum er. Út frá hesum verður arbeitt við nærri útgreiningum fyri hvørt aðalstýri sær.

Roknast má við, at landsstýrið, áðrenn Ólavsøku 1996, samtykkir tær mannagongdir, sum framyvir skulu galda í fyrisitingini viðvíkjandi framløgu av málum fyri landsstýrisfund, og mannagongdir viðvíkjandi framløgu av málum fyri landsstýrismenninar í aðalstýrunum.

## 1.2 Onnur uppskot til nýskipan

Umframt skipanina av aðalstýrunum, verður mælt til at seta í verk fleiri verkætlanir, sum bera í sær rationalisering, samanlegging av stovnum í størri og sterkari eindir, og skipan av virknari mannagongdum á ymsum økjum.

Uppskotini, talan er um verða nevnd í næsta parti, *2 Verkætlanir*. Ætlanin er, at tey einstøku evnini til verkætlanir skulu kannast, viðgerast og setast í verk komandi árini.

Nýskipanarstovan á Løgmansskrivstovuni hevur sum uppgávu at seta hesar verkætlanir í verk. Verkætlanirnar verða gjørdar í tøttum samstarvi við aðalstýrini. Í 3. parti, *Fyriskipanarætlan,* verður gjøllari greitt frá hvussu hetta skal skipast.

Harumframt verður í hesi frágreiðing, *parti 4* greitt frá kostnaði í samband við verksetan av nýskipanini, og uppskot er eisini gjørt til lýsing eftir aðalstjórum, *í parti 5*.

# 2. Verkætlanir

## 2.1 Verkætlanir

Mælt verður til, at seta í verk niðanfyri nevndu verkætlanir. Verkætlanirnar hava til endamáls at rationalisera og skapa virknari mannagongdir.

## 2.2 Løgmansskrivstovan

1. Arbeiðsbólkur eigur at verða settur til at kanna hvussu kunningarvirksemið hjá landsstýrinum skal skipast
2. Arbeiðsbólkur verður settur at gera støðuna upp viðvíkjandi lógum, tvs. hvørjar lógir mangla og gera uppskot um, hvussu arbeiðið viðvíkjandi einfaldan av lógarreglum kann skipast
3. Arbeiðsbólkur verður settur at kanna journalviðurskiftini hjá aðalstýrunum og koma við uppskotum um, hvussu journalviðurskiftini skulu skipast.

## 2.3 Fíggjarmálastýrið

1. Gjøgnumgongd av lógargrundarlagnum hjá Fíggjarmálastýrinum, viðvíkjandi tillaging til nýggja bygnaðin.
2. Arbeiðsbólkur verður settur at kanna EDV-nýtsluna í Fíggjarmálastýrinum, við tí fyri eyga at fáa virknar mannagongdir.
3. Arbeiðsbólkur verður settur at kanna um tað eru fyrimunir við at leggja Húsalánsgrunnin til skuldadeildina.
4. Uppskot eigur at verða gjørt um felags lønarútgjalding og kunningarskipan.

## 2.4 Veiðimálastýrið

1. Gjøgnumgongd av lógargrundarlagnum hjá Veiðimálastýrinum, viðvíkjandi tillaging til nýggja bygnaðin.
2. Kanning eigur at verða gjørd um, hvussu fiskiveiðieftirlitið og Lønjavningargrunnur

skipsfiskimanna, betur kunnu samskipa dátumongdina.

3. Kanning eigur at verða gjørd um, hvussu fiskiveiðieftirlitið kann fáa víðari heimildir, tá tað snýr seg um innheintan av upplýsingum av ymsum slag.

## 2.5 Vinnumálastýrið

1. Gjøgnumgongd av lógargrundarlagnum hjá Vinnumálastýrinum, viðvíkjandi tillaging til nýggja bygnaðin.
2. Arbeiðsbólkur eigur at verða settur til at kanna hvørjar fyrisitingarligar mannagongdir skulu skipast fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, Arbeiðseftirlitið og Landsdjóra- læknaembætið.
3. Uppskot eigur at verða gjørt um, hvussu Náttúru- og búnaðarstovan kann skipast
4. Uppskot eigur at verða gjørt um, hvussu framtíðar vinnumenning innan landbúnað eigur at verða skipað.
5. Arbeiðsbólkur eigur at verða settur til at endurskoða grunnar og vinnuframaskipanir og gera uppskot um, hvussu hesar skipanir skulu virka í framtíðini.
6. Kanning eigur at verða gjørd viðvíkjandi orku og fakligari kompetansu hjá Landsverkfrøðinginum í mun til nútíðar- og framtíðar tørv.

## 2.6 Mentamálastýrið

1. Gjøgnumgongd av lógargrundarlagnum hjá Mentamálastýrinum, viðvíkjandi tillaging til nýggja bygnaðin.
2. Arbeiðsbólkur eigur at verða settur til at gera bygnaðarbroytingar fyri Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Landsbókasavn, Føroya Landsskjalasavn, Føroya Fornminnissavn og Føroya Náttúrugripasavn, við tí fyri eyga at skapa ein virknan og fjølbroyttan stovn. Fiskirannsóknarstovan fær eisini tilknýti til verkætlanina
3. Arbeiðsbólkur eigur at verða settur til at gera lógargrundarlag til eitt granskingarráð.
4. Skotið verður upp, at arbeiðsbólkur verður settur at kanna, hvussu øll áhugamál verða hoyrd, tá talan er um at skipa yrkisráð fyri skúladeildina og fyri vinnuskúladeildina.
5. Arbeiðsbólkur eigur at setast til at kanna, um Skúlabókagrunnurin nøktar tørvin viðvíkjandi føroyskum undirvísingartilfari í fólkaskúlanum, og í hvønn mun skúlarnir gera nýtslu av bókunum,

sum Skúlabókagrunnurin gevur út.

## 2.7 Heilsumálastýrið

1. Gjøgnumgongd av lógargrundarlagnum hjá Heilsumálastýrinum, viðvíkjandi tillaging til nýggja bygnaðin.
2. Arbeiðsbólkur verður settur at kanna markamót til Gjaldstovuna innan fleiri virkisøkir, t.d. barnapeningur, við tí fyri eyga at skapa eina meira virkna mannagongd
3. Arbeiðsbólkur verður settur at kanna avgreiðslu av stuðulsveittum heilivági og gera uppskot til virknari mannagongdir
4. Kannað verður, hvussu viðurskiftini viðvíkjandi hjálpitólum betri kunnu samskipast
5. Arbeiðsbólkur verður settur at kanna fyrisitingarligu uppgávurnar innan hesi øki: stovnar, fíggjarætlan og fíggjarviðurskifti og starvsfólk, í sjúkrahúsverkinum og í almanna- verkinum.

# 3. Fyriskipanarætlan

## 3.1 Tíðarskeiðið fram til Ólavsøku 1996

Í tíðarskeiðnum fram til skipanina av nýggja bygnaðinum, verður verkætlanarbeiðið viðvíkjandi nærri útgreining av aðalstýrunum, skipað av løgmansstjóranum og nýskipanarstovuni, ið er skrivstova hansara. Løgmansstjórin kann fáa hjálp til hetta arbeiði frá teimum stjórum, sum verða í nýggja bygnaðinum ella frá starvsfólkum, sum stjórarnir vísa á.

## 3.2 Aftaná Ólavsøku 1996




Løgmansstjórin og aðalstjórarnir, sum verða settir, luttaka í einum stýrisbólki, sum hevur ábyrgd av at seta í verk nýggja bygnaðin.

Stýrisbólkurin skal leggja til rættis verksetanarætlanina av nýggja bygnaðinum og skal tryggja, at ætlanin verður framd í verki. Nýskipanarstovan á Løgmansskrivstovuni er skrivstova hjá stýrisbólkinum og hevur ábyrgd av at seta í verk og fylgja upp tær verkætlanirnar, sum stýrisbólkurin hevur samtykt.

Stýrisbólkurin setur arbeiðsbólkar, sum hava til uppgávu at kanna og vigerða tær ymsu ætlanirnar, sum stýrisbólkurin hevur samtykt skulu setast í verk. (sí verkætlanir)

Stýrisbólkurin ger arbeiðssetning til arbeiðsbólkarnar, og tíðarætlan fyri nær arbeiðsbólkurin skal verða liðugur við arbeiði sítt.

Fremjanin verður býtt í 3 partar. Fyrst verða verkætlanirnar lagdur til rættis, síðan skulu tær setast í verk og harnæst skulu tær virka.

Umframt tær verkætlanir, sum skulu kannast og viðgerast, verða tað onnur evni hjá stýrisbólkinum at taka støðu til, sum ikki krevja, at arbeiðsbólkur verður settur. Roknast má við at neyðugt verður at skipa fastar fundir í teim ymsu leiðslunum, serliga tá hugsað verður um, at ein tíð gongur áðrenn tey ymsu aðalstýrini og deildirnar, sum hoyra teimum til, eru flutt í somu hølir. Umráðandi er, at leiðararnir varðveita yvirlitið og kunna starvsfólkið um bygnaðarbroytingarnar og gongdina í nýskipanini. Harumframt verður mett, at tað er umráðandi, at leiðslan á aðalstýrunum vitjar stovnarnar, sum hoyra til aðalstýrini.

## 4. Játtanartørvur í sambandi við nýskipan og samskipan

Í uppskotinum til bygnaðarbroytingar verður miðjað ímóti, at tær ymsu broytingarnar skulu verða innanfyri givnu játtanarkarmarnar.

Sum greitt frá í kanningini, hevur verksetanin av ráðharrastýri á Ólavsøku 1996 við sær ein størri tørv fyri nýskipan og samskipan, sum gerð tað neyðugt at styrkja fyrisitingarligu leiðsluna. Mett verður, at hetta hevur við sær ein fíggjartørv serliga til lønir:

- *Eykajáttan í 1996 uppá 1,763 mió. kr.*
- *Játtan í 1997 uppá 5,763 mió. kr.*

Harumframt skal setast á stovn ein minni skrivstova á løgmansskrivstovuni, sum skal fyriskipa tær eftirfylgjandi bygnaðarbroytingarnar og ein vinnumáladeild í Vinnumálastýrinum:

- *Eykajáttan í 1996 uppá 264 tús. kr.*
- *Játtan í 1997 uppá 1,074 mió. kr.*

Somuleiðis skal tann nýggi miðsavnaði myndugleikin fyri fyrisitingarliga kæruskipan mennast:

- *Eykajáttan í 1996 uppá 264 tús. kr.*
- *Játtan í 1997 uppá 1,074 mió. kr.*

Allur hesin játtanartørvurin er tæt heftur at teimum politisku ynskunum, sum eru komin fram í sambandi við bygnaðarbroytingar í almennu fyrisitingini.

Í samband við verksetanina av uppskotinum um starvsfólkapolitikk, verður skotið upp at seta í starv ein starvsfólkapolitiskan ráðgeva. Í hesum sambandi verður eisini skotið upp at játta 1 mió. kr. til eftirútbúgving. Játtanarupphæddin kann minkast í tann mun tær einstøku deildirnar í aðalstýrunum, við at flyta pening millum konti, kunna fáa pening til vega til endamálið.

Harumframt er í kanningini sett fram eitt uppskot um at styrkja tað nýggja Vinnumálastýrið, av tí, at sum støðan er í Føroyum í løtuni, eigur hetta økið at mennast. Tann arbeiðsorka, sum verður á samskiftisdeildini, verður sett við at flyta játtanir frá Landsverkfrøðinginum (2 ársverk),

Telefonverkinum ( 2 ársverk) og Strandferðaskip Landsins (1 ársverk).

**Mettur játtanartørvur tilsamans:**

- ***Eykajáttan í 1996 uppá 2,991 mió. kr.***
- ***Játtan í 1997 uppá 7,911 mió. kr.***

Mælt verður tí við hesum landsstýrinum til at søkja fíggjarnevnd løtingsins um eykajáttan fyri 1996.

Bygnaðarbroytingarnar eiga at skapa grundarlag fyri at rationalisera fyrisitingarligu uppgávurnar. Skotið verður tí upp samstundis at fremja fyrisitingarligar sparingar á teimum einstøku økjunum næstu 3 árini, við tí fyri eygað at javna út tær øktu útreiðslurnar.

# 5. Stillingsopslag (udkast)

*6 Direktører til landsstyreadministrationen*

I forbindelse med styrelseslovens omdannelse af Færøernes Landsstyre fra et kollektivt organ til et ministerstyre gennemføres en reorganisering af landsstyreadministrationens opbygning med det formål at udvikle og styrke den samlede centraladministration.

Som led i omstruktureringen oprettes 5 nye generaldirektorater og en løgmanssskrivstova.

De 5 nye generaldirektorater er :

- Fíggjarmálastýrið
- Veiðimálastýrið
- Vinnumálastýrið
- Mentamálastýrið
- Heilsumálastýrið

Til at stå i spidsen for de nye enheder søges 6 direktører, hvoraf de 5 skal have titel af generaldirektør, mens 1 stilling vil få titel af direktør for lagmandens kontor.

Stillingerne ønskes besat med virkning fra **1. august 1996**.

Der er tale om særdeles krævende og udfordrende stillinger, hvor direktøren som nærmeste rådgiver for landsstyremanden og som den øverst ansvarlige embedsmand på sit forvaltningsområde, vil skulle forestå udførelsen af landsstyrets politik på ressortområdet, og samtidig får det overordnede ansvar for realiseringen af de vedtagne strukturændringer, herunder gennemførelse af en fælles personalepolitik.

Oprettelsen af generaldirektoraterne er indledningen til en længerevarende proces, hvor de nye direktører får et selvstændigt ansvar for aktivt at medvirke til udviklingen af de enkelte

generaldirektorater.

Direktørerne bliver medlemmer i en fælles chefgruppe bestående af lederne af de 5 generaldirektorater og direktøren for lagmandens kontor.

## Generelle kvalifikationskrav

For samtlige stillingers vedkommende stilles der krav om, at ansøgere må være fagligt velkvalificeret inden for området og besidde særdeles gode skriftlige og mundtlige formuleringsevner på såvel færøsk, dansk og engelsk.

Der ligges endvidere vægt på, at ansøgere besidder moderne lederegenskaber, og at de herunder er resultatorienteret, omstillingsberedte og indstillet på aktivt at videreudvikle egne lederevner.

Ved bedømmelsen af ansøgerne vil der særligt blive lagt vægt på følgende egenskaber :

- Gennemslagskraft
- Politisk flair
- Evner at motivere og udvikle chefer og medarbejdere
- Besidder god menneskekundskab
- Gode samarbejdsevner
- Troværdig
- Mobilitets- og rokeringsvilje

## Ansættelsesvilkår

Stillingerne er klassificeret i lønramme ....

Stillingerne er tjenestemandsstillinger, men kan efter aftale besættes på overenskomstvilkår.

Stillingerne ønskes gerne besat på åremål.

## Ansøgning

Ansøgning stiles til lagmanden og sendes til direktøren for lagmandens kontor.

Nærmere oplysninger om stillingerne kan fås ved henvendelse til direktøren for lagmandens kontor.